*NORÐOYA SPARIKASSI*

# Ársfrásøgn 2002

Ársfrásøgn 2002


Fígging
Ráðgeving

## Sparikassin

er sjálveigandi stovnur. Hvørki stovnarar ella onnur eru ánarar av peningaogn ella avlopi sparikassans.

## Avlop sparikassans

verður – burtursæð frá tí, sum verður nýtt til vælgerandi og almenngagnlig endamál – lagt afturat eginpeningi sparikassans, alt til tryggjan av sparipeninginum.

## Í sparikassanum

eru tygum altíð vælkomin, og starvsfólkið her er til reiðar at geva tygum leiðbeiningar og upplýsingar í fíggjarspurningum.

## INNIHALDSYVIRLIT


Um sparikassan 6
Lykla- og høvuðstøl 11
Til ábyrgdarar og viðskiftafólk 12
2002 í orðum og myndum 14
Ársfrágreiðing 26
Átekningar til ársroknskapin 29
Rakstrarroknskapur 30
Fíggjarstøða 31. desember 31
Kapitalflytingar og solvensuppgerð 32
Peningastreymsroknskapur 33
Viðmerkingar 34
Nýttur roknskaparháttur 40

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-700 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
www.ns.fo
ns@ns.fo

## Deildir

Klaksvíksvegur 77 · Tel. 475000 · Fax 476007
Leirvík · Tel. 475100 · Fax 476010
Norðdepil · Tel. 475090 · Fax 476008
Viðareiði · Tel. 475091 · Fax 476009

## Telefon- og faxtænastan

Tel. 319494 · Fax 319454

## Kort burturmist eftir avgreiðslutíð

Tel. +45 44898929

## Umboðsráð

### Klaksvíkar Kommuna

Óli Marner Christiansen, Klaksvík
Jógvan Clementsen, Klaksvík
Hilmar Danielsen, Klaksvík
Gullak F. Gullaksen, Klaksvík
Byrger Heinesen, Klaksvík
Søren Ziska Jacobsen, Klaksvík
Anna Maria Joensen, Klaksvík
Eyðálvur Menning Joensen, Klaksvík
Janus Joensen, Klaksvík
Jóhann Joensen, Klaksvík
Karl Heri Joensen, Klaksvík
Magnus Joensen, Klaksvík
Finn Kjølbro, Klaksvík
Álvur Klakk, Klaksvík
Tummas J. Lervig, Klaksvík
Heini Ósá, Klaksvík
Eli Poulsen, Klaksvík
Jóhan Andrias Reyðberg, Klaksvík
Olivur Thomsen, Klaksvík
Jóhanna á Tjaldrafløtti, Klaksvík
Jógvan Vágsheyg, Klaksvík
Hergerð Ziskason, Klaksvík

## Eystan Múlan

Absalon í Buð, Hvannasund
Jógvan Sverri Christiansen, Norðdepil
Jógvan Edmund á Geilini, Svínoy
Hanus Súni Hansen, Hattarvík
Kári Kallsberg, Viðareiði
Jákup J. Petersen, Viðareiði

## Kalsoy og Kunoy

Jógvan Joensen, Trøllanes
Páll Klettskarð, Haraldssund

## Leirvík og Føroyar annars

Kristian M. Eliasen, Leirvík
Jóannes Hansen, Toftir
Peder T. Haahr, Signabøur
Tórbjørn Jacobsen, Glyvrar
Jógvan E. Joensen, Leirvík
Margaret Johannesen, Leirvík
Edmunda Langgaard, Leirvík
Christina Nolsøe, Tórshavn
Jonna Sjúrðaberg, Leirvík

## Nevnd

Óli Marner Christiansen, *formaður,* Klaksvík
Finn Kjølbro, *næstformaður,* Klaksvík
Jógvan Joensen, Trøllanes
Álvur Klakk, Klaksvík
Páll Klettskarð, Haraldssund
Erling Petersen, Klaksvík
Kristian M. Eliasen, Leirvík, *starvsfólkaumboð*
Elmar Poulsen, Klaksvík, *starvsfólkaumboð*
Sigrun Skálagarð, Klaksvík,
*vald av Búskaparmálaráðnum*

## Stjórn

Eyðfinn Reyðberg, Klaksvík

## Grannskoðan

Martin Gaard,
løggildugur grannskoðari, København
Símun Absalonsen,
skrásettur grannskoðari, Tórshavn




| Navn | Telefon | Telefax | Teldupostur |
|---|---|---|---|
| **Stjórn** | | | |
| Eyðfinn Reyðberg | 475000 | 476000 | eydfinn@ns.fo |
| **Klaksvík** | | | |
| **Avgreiðsludeildin  og deildin við Klaksvíksvegin** | | | |
| Jákup Olsen, *leiðari* | 475065 | 476000 | jakup@ns.fo |
| Ruth Baldvinsson | 475038 | 476000 | ruth@ns.fo |
| Marjun Hansen | 475013 | 476000 | marjunh@ns.fo |
| Sigrun Heimistovu | 475000 | 476000 | sigrun@ns.fo |
| Lív Høgnesen | 475017 | 476000 | liv@ns.fo |
| Rannvá Isaksen | 475037 | 476000 | rannva@ns.fo |
| Anna Müller Jacobsen | 475042 | 476000 | anna@ns.fo |
| Súsanna Jacobsen | 475000 | 476000 | susanna@ns.fo |
| Betty Joensen | 475000 | 476000 | betty@ns.fo |
| Bjørg Johannesen | 475039 | 476000 | bjorg@ns.fo |
| Jórun Mathisen | 475035 | 476007 | jorun@ns.fo |
| Hanna Mørkøre | 475011 | 476000 | hanna@ns.fo |
| Ninni Simonsen | 475010 | 476000 | ninni@ns.fo |
| Herfrí Sørensen | 475037 | 476000 | herfri@ns.fo |
| Mása Tróndheim | 475014 | 476000 | masa@ns.fo |
| Beinta Vágsheyg | 475000 | 476007 | beinta@ns.fo |
| **Privatkundadeildin** | | | |
| Marjun E. Joensen, *leiðari* | 475046 | 476001 | marjunj@ns.fo |
| Annubeth Absalonsen | 475047 | 476001 | annubetha@ns.fo |
| Ingun Joensen | 475015 | 476001 | ingun@ns.fo |
| Thorleif Joensen | 475045 | 476001 | thorleif@ns.fo |
| Elmar Poulsen | 475043 | 476001 | elmar@ns.fo |
| Annibeth Sørensen | 475021 | 476001 | annubeths@ns.fo |

| Navn | Telefon | Telefax | Teldupostur |
|---|---|---|---|
| **Vinnudeildin** | | | |
| Eyðun Kjølbro, *leiðari* | 475055 | 476002 | eydunk@ns.fo |
| Guðrið Lava Olsen | 475052 | 476002 | gudrid@ns.fo |
| Julianna Thomsen | 475012 | 476002 | julianna@ns.fo |
| **Fyrisiting (KT-, roknskapar- og starvsfólkadeild)** | | | |
| Marner Mortensen, *leiðari* | 475070 | 476003 | marner@ns.fo |
| Durid Færø | 475068 | 476003 | durid@ns.fo |
| Marianna Hansen | 475069 | 476003 | marianna@ns.fo |
| Eyðun Nolsøe | 475072 | 476003 | eydunn@ns.fo |
| Petra Nysted | 475051 | 476003 | petra@ns.fo |
| **Marknaðardeildin** | | | |
| Gunnar Nolsøe, *leiðari* | 475064 | 476003 | gunnar@ns.fo |
| **Norðdepil** | | | |
| Alvilda Simonsen | 475090 | 476008 | alvilda@ns.fo |
| **Viðareiði** | | | |
| Alvilda Simonsen | 475091 | 476009 | alvilda@ns.fo |
| **Leirvík** | | | |
| Kristian Martin Eliasen | 475100 | 476010 | kristianm@ns.fo |
| Mary-Jana á Reynatrøð | 475101 | 476010 | mary-jana@ns.fo |





| Lyklatøl | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 34,9 | 31,0 | 31,0 | 32,5 | 30,1 |
| Kjarnukapitalprosent | 34,9 | 31,0 | 31,0 | 32,5 | 30,1 |
| Renting av eginpeningi áðrenn skatt | 11,5 | 11,4 | 11,1 | 12,5 | 12,7 |
| Renting av eginpeningi aftaná skatt | 8,7 | 10,2 | 9,0 | 10,3 | 10,0 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,7 | 2,0 | 1,6 | 1,8 | 1,8 |
| Rentuváði | 3,6 | 5,3 | 2,4 | 2,2 | 2,6 |
| Gjaldoyrastøða | 0,2 | 0,3 | 1,0 | 0,5 | 0,2 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 83,1 | 96,0 | 88,5 | 86,5 | 93,9 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 259,8 | 209,1 | 277,8 | 279,9 | 227,7 |
| Stórir kundar tilsamans | 28,9 | 39,1 | 31,6 | 29,6 | 33,5 |
| Partur av ágóða við niðursettari rentu | 0,3 | 0,2 | 0,5 | 0,1 | 0,0 |
| Burturleggingarprosent | 6,0 | 4,0 | 3,9 | 3,9 | 3,9 |
| Taps- og burturleggingarprosent í árinum | 0,1 | -0,8 | 0,8 | 0,6 | 0,6 |
| Útlánsvøkstur í árinum | 13,3 | 19,5 | 3,5 | 10,1 | 14,0 |
| Útlán í mun til eginpening | 3,4 | 3,7 | 3,5 | 3,4 | 3,5 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 38.001 | 40.368 | 46.811 | 51.551 | 55.816 |
| Virðisjavnan | 844 | -5.907 | 1.913 | 2.250 | 3.125 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 950 | 929 | 888 | 1.236 | 2.841 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **39.795** | **35.390** | **49.612** | **55.037** | **61.782** |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 21.359 | 22.562 | 23.746 | 25.682 | 28.706 |
| Avskrivingar, føst ogn | 1.463 | 748 | 972 | 1.056 | 940 |
| Tap og burturleggingar, skuldarar | 442 | -5.970 | 5.562 | 4.159 | 4.967 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **16.531** | **18.050** | **19.332** | **24.140** | **27.169** |
| Skattur | 4.017 | 1.866 | 3.632 | 4.298 | 5.832 |
| **Ársúrslit** | **12.514** | **16.184** | **15.700** | **19.842** | **21.337** |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 511.586 | 611.552 | 632.742 | 696.577 | 793.904 |
| Lánsbrøv | 187.510 | 159.615 | 236.596 | 263.529 | 244.126 |
| Innlán | 652.818 | 662.141 | 744.009 | 836.654 | 879.845 |
| Javni | 816.035 | 838.450 | 938.010 | 1.053.574 | 1.114.922 |
| Eginpeningur | 150.553 | 167.047 | 182.772 | 202.843 | 224.305 |



Eyðfinn Reyðberg
sparikassastjóri

## Til ábyrgdarar og viðskiftafólk

Árið, ið fór, gjørdist eitt gott ár hjá sparikassanum. Úrslitið áðrenn skatt var góðar 27 mió. kr., og hetta eru vit væl nøgd við.

Havast skal í huga, at tað er neyðugt hjá bæði vinnufyritøkum og privatum at leggja uppfyri, nú góðar tíðir eru. Hetta roynir sparikassin eisini at liva upp til.

### Ábyrgdaraval

Í mars verður aftur ábyrgdaraval í sparikassanum. Hetta er triðja ferðin, at umboðsráð verður valt. Vit fegnast tí um, at áhugin fyri valinum aftur hesaferð er stórur. Umboðsráðið er hægsti myndugleiki sparikassans, og verður nevndin vald av umboðsráðnum. Umboðsráðið hevur tí avgerandi ávirkan á framtíð sparikassans.

Umboðsráðið hevur altíð verið bæði áhugað í og eldhugað fyri, at sparikassin hevur tað gott og mennist.

Góðu ábyrgdarar, gerið tykkara ávirkan galdandi, nú valt verður.

### Ábyrgdarafundurin

Tá vit fyri átta árum síðani høvdu fyrsta ábyrgdarafundin, tordu vit ikki at vóna, at hesin skuldi fáa so góða undirtøku millum ábyrgdararnar.

Nú vit á fimta sinni skulu halda ábyrgdarafund, fegnast vit um, at áhugin er stórur. Vit meta eisini, at hetta er eitt gott høvi hjá øllum okkum, sum á einhvønn hátt ábyrgdast fyri sparikassanum, at møtast undir øðrvísi umstøðum. Og hetta er samstundis ein góður háttur hjá okkum at fáa tann boðskap út, sum liggur okkum á hjarta.

Vit gleða okkum at hittast tann 21. mars.

### Sparikassin á netinum

Í vár letur nýggi netsparikassin upp. Øll, ið hava atgongd til internetið, kunnu tá fáa fult yvirlit yvir konti sínar, gera flytingar, umframt gera útrokningar beinleiðis heimanífrá.

Hetta verður ein stórhending. Tá ber til á ein heilt annan hátt at røkka sparikassanum, eisini uttanfyri vanliga avgreiðslutíð.



### Tann lokali sparikassin

At vera lokalur setur eisini krøv til sparikassan um eisini at vísa hetta í verki.

Ein fyrimunur er, at allar avgerðir verða tiknar á staðnum og av staðkendum fólki. Mál okkara er, at allar avgerðir verða tiknar av tí starvsfólki, sum tú tosar við og kennir.

Annar málsetningur okkara er, at lata part av inntøku okkara út aftur sum stuðul til mentan, ítrótt og onnur tiltøk, ið gera lívið meira fjøltáttað. Og vit halda okkum fáa meira aftur enn vit lata út, tá ið vit merkja tann stuðul, sparikassin hevur.

Vit leggja dent á at vera lokal, men halda okkum eisini hava vilja og evni til at avgreiða kund-ar úr øllum landinum.

### Framtíðin

Vit hava nú upplivað samanhangandi fleiri góð ár, men minnini frá kreppuárunum hava vit framvegis. Tað er tí at fegnast um, at føroyska samfelagið í dag byggir á tryggari grund enn tá.

Vit vita tó, at livistøði okkara er tengt at, hvat fæst burturúr innan fiskivinnuna.

Okkara ráð eru tí, at vit altíð syrgja fyri at hava ávísa eginfígging, tá íløgur verða gjørdar, og at tey, ið hava stóra skuld, royna at niðurgjalda hesa, nú rentan er metlág og inntøkurnar góðar.

Eg vil vegna sparikassan nýta høvið at takka øllum fyri gott samstarv í farna ári. Stóra tøkk til starvsfólkið fyri góða úrslitið.

Vit hava gott mót um framtíð sparikassans, og arbeiða støðugt við at menna stovnin, men fremst vilja vit altíð seta teg sum kunda, og tørv tín á hollari tænastu og ráðgeving.

Vælkomin í sparikassan!

Eyðfinn Reyðberg
sparikassastjóri

## 2002 í orðum og myndum

Við ársbyrjan vitjaði nevndin í Lokale Pengeinstitutter í Føroyum og mánadagin 7. februar varð vitjað í sparikassanum.

Lokale Pengeinstitutter er felag, ið umfatar umleið 128 bankar, sparikassar og andelskassar í Danmark, Føroyum og Grønlandi, og hvørs grundstøði er lokala tilknýtið. Felagið varð stovnað í 1905 og nevndist tá De Danske Provinsbankers Forening, og á leið 87 ár seinri, við ársenda 1992, varð stigið tikið til eitt størri felag, ið fekk navnið Lokale Pengeinstitutter.



Eyðfinn Reyðberg, Norðoya Sparikassi; Finn Strier Poulsen, Egnsbank Han Herred; Jens Nielsen, Egnsbank Han Herred; Ivan Christiansen, Sparekassen Thy; Jørn Balch, Morsø Sparekasse; Lynge Thang Jørgensen, Sparekassen Lolland; og Jacob Leth, Sparekassen Kronjylland og formaður í Lokale Pengeinstitter, uttanfyri sparikassan. Jacob Leth hevur eisini áður starvast í Føroyum

### Heimskendi klovnurin Pjerrot á vitjan

Eini 1.400 fólk vitjaðu stórfingna familjutiltakið við klovnunum Pjerrot, Fjotta og Bobo, umframt búktalaranum Absalon Áargarð og Silva, ið var í KÍ-Høllini mikudagin 20. februar 2002.







Høvuðsnavnið var heimskendi klovnurin Pjerrot, sum hevur sett lit á donsku stuttleikaparkina »Bakken« í meiri enn 200 ár.

Tiltakið varð skipað í trimum sýningum: Fyri børnum undir skúlaaldri, millum 7 og 9 ár og millum 10 og 12 ár.

### Óli Marner Christiansen og Finn Kjølbro afturvaldir

Á aðalfundi sparikassans fríggjakvøldið 22. februar vórðu Óli Marner Christiansen og Finn Kjølbro, ið báðir stóðu fyri vali, afturvaldir. Nevndin skipaði seg við Óla Marneri Christiansen sum formanni og Finni Kjølbro sum næstformanni.

Á fundinum vóru gjørdar nakrar broytingar í viðtøkum og valreglum sparikassans. M.a. varð »umsjónarráð« broytt til »nevnd«.



Óli Marner Christiansen



Finn Kjølbro





Á Grækarismessu vitjaði borgarstjórin á Akranesi, Gísli Gislason, í sparikassanum, har hann greiddi frá gongdini frammanundan, at undirsjóvartunnilin undir Hvalfirði, ið førir til Akranes, varð gjørdur, og hvønn týdning hesin hevur havt fyri alt økið, og hósdagin 14. mars helt Gísli Gislason almennan fyrilestur í Tekniska Skúla, har høvi eisini var at seta spurningar. Handilsfelagið í Klaksvík tók stig til ferðina, ið varð fyriskipað saman við Vinnulívsráðnum.

Á myndini eru Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri, Gísli Gislason, borgarstjóri á Akranesi, og Karl Birgir Isaksen, Vinnulívsráðið í Norðoyggjum.

## Útbúgving og førleiki

Eins og á øðrum virkisøkjum er fíggjarheimurin í støðugari menning. Hetta setur stór krøv, ikki minst til útbúgving og eftirútbúgving.

## Næmingaútbúgving

Leita vit aftur í sekstiárini var sparikassaútbúgvingin skipað sum lærutíð í sparikassanum við skúlagongd í Danmark. Men útbúgving og skúli eru støðugt broytt síðani tá, og feskasta – og mest umfatandi – broytingin varð sett í verk í august 2002, tá fyrstu næmingarnir fóru í holt við nýggju fíggjarútbúgvingina.

Henda útbúgving er munandi øðrvísi, eitt nú er hon skipað soleiðis, at næmingurin, umframt innlit í vanligt peningastovnsvirksemi sum fígging og pensjónir, eisini verður útbúgvin innan eitt nú trygging. Harumframt fær hann beinanvegin eina sonevnda Útbúgvingarbók, nevnd »Kompetence ABC«, og sum tryggjar, at útbúgvingin umfatar øll virkisøki sparikassans.



Súsanna Jacobsen telist millum næmingarnar í fyrsta árgangi á nýggju og spennandi fíggjarútbúgvingini

## Eftirútbúgving

Sparikassin leggur stóran dent á, at førleiki og vitan til einhvørja tíð er »gearað« til verandi og nýggjar avbjóðingar. Í 2000 tóku t.d. fimm starvsfólk FinansDiplom útbúgving, ið tekur tvey til trý ár, og umfatar privat- og vinnukundarøkt við støði í eitt nú roknskapi, virðisbrøvum og løgfrøði. Og í 2002 eru trý starvsfólk afturat farin undir útbúgvingina.

Farna árið er samstarvið millum Finanssektorens Uddannelsescenter og sparikassan økt munandi. Eitt úrslit av hesum var, at Bjarne Fries og Dorrit Sidenius, sum bæði starvast sum chefkonsulentar, vóru í Klaksvík, har tey í juni mánað høvdu skeið fyri starvsfólkunum á privat- og vinnudeildini.




Útbúgving og skeiðvirksemi er við til at tryggja viðskiftafólki sparikassans eina so góða og neyva ráðgeving sum gjørligt. Her eru Bjarne Fries og Dorrit Sidenius frá Finanssektorens Uddannelsescenter í Klaksvík og undirvísa starvsfólkunum á vinnu- og privatkundadeildini




Bjarne Fries, chefkonsulentur, Eyðun Nolsøe, útbúgvingarleiðari, og Dorrit Sidenius, chefkonsulentur, á veg niðan Egg á Viðareiði



Sparikassafólk á skúlabonki

## Menning og samstarv

Íblástur er góður og kann koma úr ymsum ættum. Eitt nú hevur sparikassin samstarv við fleiri peningastovnar, og er ein teirra Morsø Sparekasse, ið liggur í Nykøbing M. Í apríl mánað vitjaðu tvey av starvsfólkum teirra í Norðoya Sparikassa, og í november vitjaðu Marianna Hansen og Annibeth Sørensen frá Norðoya Sparikassa Morsø Sparekasse. Annibeth og Marianna hava fingið nógv burturúr: »Tað er altíð gott at síggja, hvussu hini gera, antin sum ein staðfesting av, at tað tú gerst er hitt rætta, ella at tað kann gerast betri,« siga tær báðar við einum brosi.



Marianna Hansen og Helle Laustsen avmyndaðar í privatkundadeildini hjá Morsø Sparekasse



Annibeth Sørensen og Marianna Hansen saman við Jørn Balch, stjóra í Morsø Sparekasse

## Gullkonto 10 ár

Í 1992 sá Gullkontoskipanin dagsins ljós á fyrsta sinni og nú skipanin rundaði tey 10 árini, varð hetta markerað við ein dagførdum og turboløddum Gullálmanakka.



Gull álmanakkin

## Umboðsráðið fund í Mikladali

Hósdagin 22. august varð hálvárligi umboðsráðsfundur sparikassans hildin í Avhaldshúsinum í Mikladali. Í frálíka dýrdarveðrinum varð samstundis skipað fyri útferð, har umboðsráðslimir fingu høvi at vitja á Kalsoynni. Eitt nú varð steðgað á við Minnisvarðan á Syðradali, í kirkjuni á Húsum og norðuri á Kallinum, har vitin stendur. Um kvøldið var umboðsráðsfundur, har greitt varð frá um hálvársúrslit og virksemi sparikassans. Eisini helt Niels Thygesen, ið er professari við Københavns Universitet, áhugaverdan og viðkomandi fyrilestur undir heitinum »Internationale valutaforhold, herunder Færøernes muligheder, hvis Danmark tilslutter sig Euroen«.

Hetta er annars triðju ferð, at sparikassin heldur hálvárliga umboðsráðsfundin uttanfyri Klaksvík. Áður er fundurin hildin á Viðareiði og í Leirvík.





Umboðsráðs- og nevndarlimir í dýrdarveðri við vitan norðuri á Kallinum

## Biotøkni úr hjáframleiðslum úr havinum

Týskvøldið 17. september kl. 19.30 skipaði sparikassin fyri almennum fyrilestri í matarhøllini á Kósini, har evnið var biotøkni úr hjáframleiðslum úr havinum. Á fundinum helt Geir Wilhelm Wold, stjóri í Maritex, fyrilestur undir heitinum »Gagnnýtsla av hjáframleiðslum úr havinum – framleiðsla av hávirðis úrdráttum«, meðan Egil Olsen, stjóri í Faroe Marine Biotech, gjørdi eina virkislýsing av fyritøkuni.

Egil Olsen nevndi, at stórir møguleikar eru í biotøkniskari vinnu, og at ótroyttir møguleikar fyri hjáframleiðslum eru í føroysku fiski- og alivinnuni. Eisini vísti hann eitt nú á verkætlanina við virðisøking av fiskaryggjum og øðrum fráskurði frá fiski við nýtslu av kveikum (ensymum). Endamálið við verkætlanini er m.a. at finna fram til, um lívrunnin evni kunnu skiljast úr fiska-ryggjum við nýtslu av ensymum og at royna at reinsa tað lívrunna tilfarið, somuleiðis við at nýta ensymir.

Eisini borðreiddi Poul Rustin við vælsmakkandi røstu fiskasúpanini, ið er gjørd burtur úr turk-aðum toskarhøvdum. Eini 100 fólk vóru á fundinum.



Nógv fólk møttu til fundin um biotøkni



## Sparikassin høvuðssponsorur hjá Klaksvíkar Hornorkestri

Í summar tók Ulf Nordlund við sum nýggjur leiðari hjá Klaksvíkar Hornorkestri og leygardagin 23. november hevði orkestrið sína fyrstu konsert við nýggja leiðaranum. Á væleydnaðu konsertini luttók eisini kvinnukórið Suð, ið er undir leiðslu av Steinvør Fonn. Umframt, at bæði kór og orkestur framførdu nakrar sangir hvør sær, fingu tey eisini høvi at royna seg saman.

Meðan sponsoravtalur eru vanligar í ítróttarhøpi, er hetta heldur óvanligari, tá talan er um føroyskan tónleik, men á konsertini leygardagin skrivaðu Andrass Sólstein, formaður í Klaksvíkar Hornorkestri, og Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri, undir nýggja trý ára sponsoravtalu, ið telist millum tær fyrstu í Føroyum av sínum slag.



Konsert við Klaksvíkar Hornorkestri í skúlanum við Ósánna



Húsini hjá Mallu eru nú niðurtikin og partvís endurnýtt eysturi í Barmi. Eftir ársskiftið verða eisini húsini hjá Skós niðurtikin og tá verður alt økið brúkt til parkeringspláss



Á sumri varð farið at umbyggja loftið á høvuðsskrivstovu sparikassans í Klaksvík. Á umbygda loftinum verða fyrisiting, marknaðardeild, grannskoðan og kantina

## Jól í sparikassanum

Við tónleiki, jólamanni, Silva, kaffi, køkum og leskidrykki til børnini bjóðaði sparikassin til uttandura jólahugna allar hósdagarnar í Advent. Hin 5. desember spældi Klaksvíkar Hornorkestur; 12. desember sungu systrarnar Arnfríð og Rannvá Lützen, meðan Erik Biskopstø og Ingi Isaksen spældu afturvið; og 19. desember sungu Arnfríð Lützen, Pætur við Keldu, Tóra við Keldu, Steinvør Fonn, og systrarnar Astrid og Mása Tróndheim.









Arnfríð og Rannvá Lützen



Pætur við Keldu

## Silvi & sjórænararnir

Mánadagin 2. desember kom jólablaðið Silvi & sjórænararnir. Í blaðnum er Silvateknisøga, sum Óli Petersen hevur teknað, Silvaplakat og kappingar, umframt ein rúgva av øðrum tilfari.



Jákup Olsen




## Nýggjur avgreiðsluleiðari

1. juni varð Jákup Olsen settur í starv sum nýggjur avgreiðsluleiðari í Norðoya Sparikassa. Jákup er útbúgvin bankamaður, hevur starvast í sparikassanum síðani 1983, tey flestu árini sum innanhýsis grannskoðari.

Umframt høvuðsavgreiðsluna umfatar starvið deildirnar við Klaksvíksvegin, í Norðdepli, á Viðareiði og í Leirvík.

## Vann Grand Prix og FM

15 ára gamli Hans Krosstein fór at venja til súkklukappingar seinast í apríl mánaði 2002. Fyrsta kappingin var Grand Prix súkklukappingin, ið byrjaði á Norðoyastevnu og helt fram á føroysku summarstevnunum. Eisini gjøgnumførdi hann Statoil kring Føroyar, eins og hann í september luttók í FM. Í bæði Grand Prix og FM eydnaðist honum at gerast nr. 1 í sínum bólki.



1. november fór Bill Mc. Leod Jacobsen í farloyvi. Hetta árið starvast hann sum ungdómsvenjari og samskipari hjá KÍ



Hálvan oktober varð Mása Tróndheim sett í starv sum avloysari í Norðoya Sparikassa



15 ára gamli Hans Krosstein

## Standmyndin av J. F. Kjølbro

Sera nógv fólk vóru samankomin, tá standmyndin av vinnulívsmanninum, ið eisini taldist millum stovnarar sparikassans, J. F. Kjølbro, varð avdúkað 26. mai. Snotuliga standmyndin er gjørd av myndahøggaranum Hans Paula Olsen og varð latin Klaksvíkar Kommunu í samband við 80 ára stovningardag sparikassans 24. september 1999.



Kitty og Ester, døtur hjá J. F. Kjølbro



Eyðfinn Reyðberg, sparikassastjóri




Luttakararnir á 1st Klaksvík International avmyndaðir uttanfyri Hotel Norð á Viðareiði, har kappingin fór fram

Leygardagin 12. oktober var býráðshøllin í Klaksvík karmur um lutakastið í samband við talvkappingina 1st Klaksvík International, sum Talvsamband Føroya skipaði fyri. Kappingin varð hildin á Hotel Norð og taldi 10 luttakarar, ið komu úr Danmark, Svøríki, Týsklandi og Føroyum. Føroysku luttakararnir vóru John Arni Nilssen, Heini Olsen, Ólavur Simonsen, Eyðun Nolsøe og Hans Kristian Simonsen.



## Sparikassin stuðlar

Umframt eitt virkið vinnulív, hevur útboðið av frítíðarvirksemi umframt tey hugskot, ið hvør sær kann fáast við, alstóran týdning fyri eitthvørt samfelag, tað veri seg lítið, stórt ella lokalt. Sparikassin telist ofta millum stuðlarnar, og millum teirra, ið sparikassin hevur stuðlað farna árið, eru m.a. hesi:

17 Sangarar; Áhugabólkurin Gamli Skúli, Leirvík; Dagtilhaldið; Felagskórið Gøta/Leirvík; Fuglafjarðar Sangkór; Grunnurin Dragin; Hjartafelagið; KFUM & K skótarnir í Klaksvík; Klaksvíkar Brigdefelag; Klaksvíkar Fimleikarfelag; Klaksvíkar Hornorkestur; Klaksvíkar Róðrarfelag; Klaksvíkar Sjónleikarfelag; Klaksvíkar Talvfelag; KT-Klekingardepilin; KÍ; Leirvíkar Gentukór; LÍF; Mentunarhúsið Atlantis; Mentunarhúsið í Fuglafirði; Mjølnir; Nordatlantisk Kulturfestival við Føroyahúsinum í Keypmannahavn; Norðoya Ellis- og Vistarheim; Sigurfarið & Techanik Tarassov (framsýning og vitjan í samband við bjargingina, sum manningin á Sigurfarinum framdi í 1982); Skótalið Nólsoyar Páls í Klaksvík; Stjørnan; Svimjifelagið Ægir; Svínoyar Bygdafelag og Talvsamband Føroya.



Kappróður á Norðoyastevnu





Sparikassin stuðlaði eisini afturvendandi innandura sjómannakappingini í fótbólti, sum í 2002 var í KÍ-Høllini leygardagin 28. desember. Tilsamans 41 manningar við umleið 230 monnum luttóku. Manningin á Sundabergi gjørdist nr. 1, Varðin nr. 2, og Søkin nr. 3.



1. deild hjá KÍ kvinnum gjørdist aftur Føroyameistari í 2002



## Tónleikagrunnur Norðoya Sparikassa

3 fløgur, sum eru stuðlaðar av tónleikagrunninum, gjørdust veruleiki í 2002. Hesar eru *Honkey Tonk Memories* við Ragnari í Vík, *Waiting in the moonlight* við Brandi Enni og *Sooner or later* við Hans Peturi í Brekkunum.



## Rakstur

Árið 2002 gjørdist gott hjá Norðoya Sparikassa. Ársroknskapurin vísir eitt avlop áðrenn skatt uppá 27,2 mió. kr., ímóti 24,1 mió. kr. í 2001. Endaliga ársúrslitið, eftir skatt, gjørdist 21,3 mió. kr. ímóti 19,8 mió. kr. í 2001.

## Inntøkur

Netto rentuinntøkurnar øktust úr 49,2 mió. kr. til 53,3 mió. kr. Hesin vøkstur stavar frá øktum útlánsvirksemi.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar vóru 55,8 mió. kr. í 2002 ímóti 51,6 mió. kr. í 2001, ein vøkstur uppá 8%.

Sparikassin hevði í 2002 ein vinning av virðisjavnan av lánsbrøvum uppá 3,1 mió. kr. Vøksturin í altjóða búskapinum er lítil og eingin. Hetta ger, at vit í dag hava eitt metlágt rentustøði.

## Útreiðslur

Útreiðslur til starvsfólk, umsiting og aðrar vanligar útreiðslur vóru 28,7 mió. kr. í 2002 ímóti 25,7 mió. kr. í 2001. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 11,7%.

Hesin vøkstur er størri enn vøksturin í netto-, rentu og kostnaðarinntøkunum. Sparikassin heldur framvegis fast við málsetning sín um, at vøksturin í útreiðslunum skal vera minni enn vøksturin í inntøkunum.

Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum eru í 2002 0,9 mió. kr., ið er 0,1 mió. kr. minni enn í 2001.

Netto avskrivingar og burturleggingar uppá útlán vóru 5 mió. kr. í 2002 móti 4,2 mió. kr. í 2001. Hækkingin í burturleggingum stavar frá, at meira er sett av móti tapum uppá vinnukundar.

## Gjaldføri og solvensur

Gjaldførið hjá Norðoya Sparikassa er gott. Við árslok 2002 var gjaldførið 303 mió. kr. Hetta er 75% av stuttfreistaðu skyldum sparikassans. Lógin krevur 15%. Av samlaðu skyldum sparikassans er hetta 33%. Lógin krevur her 10%.

Solvensur sparikassans er nú 30,1%. Við árslok 2001 var hann 32,5%. Lógin krevur 8%.



## Fíggjarstøðan

Útlán sparikassans vóru við árslok 2002 794 mió. kr. og eru tey í árinum vaksin við 14%.

Innlánið er í sama tíðarskeiði økt við 5,2% og er nú 880 mió. kr.

Fíggjarstøða sparikassans javnvigar við 1.115 mió. kr., og svarar hetta til ein vøkstur uppá 5,8%.

Eginogn sparikassans er nú 224 mió. kr. Sparikassin hevði í 2002 eina renting av eginpeninginum áðrenn skatt uppá 12,7% móti 12,5% í 2001.

## Býti av ársúrsliti

Nevndin skjýtur upp, at av ársúrslitinum 21,3 mió. kr., saman við fluttum vinningi frá undanfarnum árum 199 mió. kr. og gávugrunninum 1 mió. kr., ella íalt tkr. 221.363, verða lagdar 1 mió. kr. í gávugrunnin, og tkr. 220.363 verða fluttar til næsta ár.

## Starvsfólk

Starvsfólkatalið í sparikassanum var við árslok 33,3 umroknað til fulla tíð, ímóti 32,4 fólkum í 2001.

## Framtíðin

Eftir at roknskapurin hjá Norðoya Sparikassa er avgreiddur, eru ikki hendar broytingar, ið eru av týdningi, tá metast skal um roknskaparúrslit og fíggjarligu støðu sparikassans.

Føroyski búskaparvøksturin er nú minkaður, og gongdin í altjóða búskapinum er ikki positiv.

Við hesum í huga, vænta vit ikki, at árið 2003 verður eins gott og 2002.





Nevnd og stjórn Norðoya Sparikassa hava í dag viðgjørt og góðtikið ársroknskapin fyri 2002, ið vit viðmæla til aðalfundin at góðkenna.

Klaksvík, hin 4. februar 2003

Stjórn

Eyðfinn Reyðberg

Nevnd

Óli Marner Christiansen
*formaður*

Finn Kjølbro
*næstformaður*

Jógvan Joensen

Álvur Klakk

Páll Klettskarð

Erling Petersen

Kristian Martin Eliasen

Elmar Poulsen

Sigrun Skálagarð

## Umboðsráðsvaldu grannskoðararnir

Vit hava grannskoðað ársroknskapin 2002 hjá Norðoya Sparikassa, greiddur av leiðsluni.

## Grannskoðanin

Vit hava í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarreglur skipað og framt grannskoðanina við atliti til at fáa eina grundaða sannføring um, at ársroknskapurin er uttan týðandi villur ella vantar týðandi upplýsingar. Undir grannskoðanini hava vit eftir eini meting um týdning og tapsvanda kannað grundarlagið og prógv fyri tær í roknskapinum nevndu upphæddir og aðrar upplýsingar. Vit hava samstundis tikið støðu til tann av leiðsluni valda roknskaparhátt og roknskaparligu metingar, eins og vit hava mett um upplýsingarnar í roknskapinum sum heild eru nøktandi.

Tann framda grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til nakað fyrivarni.

## Niðurstøða

Okkara fatan er, at ársroknskapurin er í tráð við tey krøv, ið lóggávan setur til roknskaparframløgu, og at roknskapurin gevur eina rætta mynd av sparikassans ogn og skuld, fíggjarligu støðuni og úrslitinum.

København, hin 4. februar 2003

Martin Gaard
*løggildugur grannskoðari*

Tórshavn, hin 4. februar 2003

Símun Absalonsen
*skrásettur grannskoðari*



| Viðm. | | 2002<br>1.000 DKK | 2001<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur o.a. | 74.049 | 74.975 |
| 2 | Rentuútreiðslur o.a. | 20.737 | 25.732 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **53.312** | **49.243** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 44 | 41 |
| | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 2.571 | 2.350 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 111 | 83 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **55.816** | **51.551** |
| 3 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | 3.125 | 2.250 |
| 4 | Aðrar vanligar inntøkur | 2.841 | 1.236 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 28.335 | 25.330 |
| 6 | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 940 | 1.056 |
| 7 | Aðrar vanligar útreiðslur | 371 | 352 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 4.967 | 4.159 |
| | **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **27.169** | **24.140** |
| 23 | Skattur | 5.832 | 4.298 |
| | **Ársúrslit** | **21.337** | **19.842** |
| | **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| | Ársúrslit | 21.337 | 19.842 |
| | Flutt úr gávugrunni | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 199.026 | 179.184 |
| | **Til taks tilsamans** | **221.363** | **200.026** |
| | Lagt í gávugrunn | 1.000 | 1.000 |
| | At flyta til næsta ár | 220.363 | 199.026 |
| | **Tilsamans nýtt av peningi, ið er til taks** | **221.363** | **200.026** |

| Viðm. | | 2002<br>1.000 DKK | 2001<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi | | |
| | uttan uppsøgn í tjóðbankum | 5.995 | 5.522 |
| 8 | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 52.969 | 71.083 |
| 9 | Útlán | 793.904 | 696.577 |
| 10 | Lánsbrøv | 244.126 | 263.529 |
| 11 | Partabrøv o.a. | 921 | 921 |
| 11 | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 4.650 | 0 |
| 12 | Ítøkiligar ognir | 8.823 | 10.398 |
| 13 | Aðrar ognir | 3.534 | 5.534 |
| | **Ogn tilsamans** | **1.114.922** | **1.053.564** |
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | **Skuld** | | |
| 14 | Skuld til peningastovnar | 0 | 0 |
| 15 | Innlán | 879.845 | 836.654 |
| | Onnur skuld | 7.749 | 11.236 |
| 16 | Burturleggingar til útreiðslur | 3.023 | 2.831 |
| | **Skuld tilsamans** | **890.617** | **850.721** |
| | **Eginpeningur** | | |
| 17 | Ábyrgdarpeningur | 2.942 | 2.817 |
| | Gávugrunnur | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 199.026 | 179.184 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 21.337 | 19.842 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **224.305** | **202.843** |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **1.114.922** | **1.053.564** |
| 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| | Ábyrgdir o.a. | 34.230 | 17.143 |
| | Aðrar ábyrgdir | 1.142 | 5.424 |
| | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **35.372** | **22.567** |

| Viðm. | | 2002<br>1.000 DKK | 2001<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Kapitalflytingar** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 2.817 | 2.588 |
| | Tilgongd í árinum | 153 | 249 |
| | Frágongd í árinum | 28 | 20 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **2.942** | **2.817** |
| | Gávugrunnur við ársbyrjan | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt til yvirskotsbýti | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt frá býti av ársvinningi | 1.000 | 1.000 |
| | **Gávugrunnur við ársenda** | **1.000** | **1.000** |
| | Flutt avlop við ársbyrjan | 199.026 | 179.184 |
| | Flutt frá gávugrunni, netto | 0 | 0 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 21.337 | 19.842 |
| | **Flutt avlop við ársenda** | **220.363** | **199.026** |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **224.305** | **202.843** |
| | **Solvensuppgerð** | | |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg | 224.305 | 202.843 |
| | Ábyrgdarkapitalur aftaná frádrøg | 224.305 | 202.843 |
| | Vektaðar ognir, ikki íroknaðar handilsgoymslu | 642.772 | 547.758 |
| | Vektaði tøl undir strikuni | 26.483 | 11.310 |
| | Vektaði tøl við marknaðarváða | 75.829 | 65.116 |
| | **Vektaði tøl tilsamans** | **745.084** | **624.184** |
| | Solvensprosent sambært BSL §21, stk.1 | 30,1% | 32,5% |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg í prosentum av vektaðum tølum tilsamans | 30,1% | 32,5% |



| Viðm. | | 2002<br>1.000 DKK | 2001<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Rakstur** | | |
| | Ársúrslit eftir skatt | 21.337 | 19.842 |
| | Broytingar viðv. upphæddum uttan gjaldførisárin: | | |
| | Útsettur skattur | 251 | 0 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 940 | 1.056 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 4.967 | 4.159 |
| | Burturleggingar til útreiðslur | -59 | 56 |
| | **Íalt frá rakstri** | **27.436** | **25.113** |
| | **Rakstrarkapitalur** | | |
| | Útlán | -102.294 | -67.994 |
| | Innlán | 43.191 | 92.645 |
| | Aðrar ognir | 2.000 | -1.585 |
| | Onnur skuld | -3.487 | 2.782 |
| | **Íalt frá rakstrarkapitali** | **-60.590** | **25.848** |
| | **Íløgur** | | |
| | Lánsbrøv | 19.403 | -27.654 |
| | Partabrøv | 0 | -200 |
| | Kapitalpartar | -4.650 | 0 |
| | Ítøkiligar ognir | 635 | 185 |
| | **Íalt frá íløgum** | **15.388** | **-27.669** |
| | **Fígging** | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 125 | 229 |
| | Broytingar í gjaldføri | -17.641 | 23.521 |
| | Gjaldføri við ársbyrjan | 76.605 | 53.084 |
| | **Gjaldføri við ársenda** | **58.964** | **76.605** |



| Viðm. | | 2002<br>1.000 DKK | 2001<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur o.a.** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 2.201 | 3.009 |
| | Útlán | 59.067 | 56.773 |
| | Lánsbrøv | 12.781 | 15.193 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **74.049** | **74.975** |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 0 | 0 |
| | Innlán | 20.629 | 25.602 |
| | Ábyrgdarpeningur | 108 | 130 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **20.737** | **25.732** |
| 3 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | 3.118 | 2.201 |
| | Gjaldoyra | 7 | 49 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **3.125** | **2.250** |
| 4 | **Aðrar vanligar inntøkur** | | |
| | Nettoúrslit av rakstri av fastari ogn | 460 | 505 |
| | Aðrar vanligar inntøkur | 2.381 | 731 |
| | **Aðrar vanligar inntøkur tilsamans** | **2.841** | **1.236** |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a.** | | |
| | Løn og samsýning til nevnd | 360 | 300 |
| | Løn og samsýning til stjórn | 643 | 647 |
| | Løn og samsýning til umboðsráð | 26 | 0 |
| | Løn til starvsfólk | 9.117 | 9.228 |
| | Eftirløn | 1.245 | 1.135 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 745 | 763 |
| | **Starvsfólkaútreiðslur tilsamans** | **12.136** | **12.073** |
| | Aðrar umsitingarútreiðslur | 16.199 | 13.257 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. tilsamans** | **28.335** | **25.330** |

| Viðm. | | 2002<br>1.000 DKK | 2001<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 5 | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk (framhald) | 33,3 | 32,4 |
| | **Útreiðslur til grannskoðarar** | **788** | **352** |
| | - Harav annað arbeiði enn grannskoðan | 75 | 75 |
| 6 | **Avskrivingar av ítøkiligum ognum** | | |
| | Bygningar | 176 | 303 |
| | Maskinur og innbúgv | 764 | 753 |
| | **Avskrivingar av ítøkiligum ognum tilsamans** | **940** | **1.056** |
| 7 | **Aðrar vanligar útreiðslur** | | |
| | Útgoldið úr gávugrunninum | 371 | 352 |
| | Aðrar vanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| | **Aðrar vanligar útreiðslur tilsamans** | **371** | **352** |
| 8 | **Ogn hjá peningastovnum o.ø.** | | |
| | Uttan uppsøgn | 52.969 | 60.583 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 0 | 10.500 |
| | **Ogn hjá peningastovnum o.ø. tilsamans** | **52.969** | **71.083** |
| 9 | **Útlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 21.039 | 8.496 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 31.376 | 41.118 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 80.082 | 78.994 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 278.781 | 241.818 |
| | Yvir 5 ár | 382.626 | 326.151 |
| | **Útlán tilsamans** | **793.904** | **696.577** |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar** | | |
| | Burturlagt uppá útlán og ábyrgdir við ársenda | 33.517 | 28.549 |
| | Burturlagt við ársenda uppá ogn hjá peningastovnum og aðrar postar við kredittváða | 0 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar tilsamans** | **33.517** | **28.549** |

| Viðm. | | 2002<br>1.000 DKK | 2001<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 9 | Akkumuleraðar burturleggingar í % av | | |
| | bruttoútlánum við ársenda (framhald) | 3,9% | 3,9% |
| | **Ikki renturoknað áogn við ársenda** | **78** | **439** |
| 10 | **Lánsbrøv** | | |
| | **Børsskrásett** | **244.126** | **263.529** |
| 11 | **Partabrøv** | | |
| | **Onnur** | **921** | **921** |
| | **Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum** | | |
| | **Onnur** | **4.650** | **0** |
| | **Fíggjarlig umsetningsogn** | | |
| | Fíggjarlig umsetningsogn ásett til marknaðarvirði | 244.126 | 263.529 |
| | Munur millum útveganarvirði av fíggjarligari umsetningsogn | | |
| | omanfyri og hægra marknaðarvirði uppgerðardagin | 2.233 | 967 |
| 12 | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Fastar ognir** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 16.102 | 16.517 |
| | Tilgongd | 0 | 0 |
| | Frágongd | 6.566 | 415 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **9.536** | **16.102** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 8.095 | 7.792 |
| | Avskrivingar í árinum | 176 | 303 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 4.987 | 0 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **3.284** | **8.095** |
| | **Bókað virði við ársenda** | **6.252** | **8.007** |
| | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Maskinur og innbúgv** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 8.405 | 8.175 |




| Viðm. | | 2002<br>1.000 DKK | 2001<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 12 | Tilgongd (framhald) | 1.094 | 230 |
| | Frágongd | 250 | 0 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **9.249** | **8.405** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 6.014 | 5.261 |
| | Avskrivingar í árinum | 764 | 753 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 100 | 0 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **6.678** | **6.014** |
| | **Bókað virði við ársenda** | **2.571** | **2.391** |
| | **Bókað virði við ársenda, ítøkiligar ognir tilsamans** | **8.823** | **10.398** |
| 13 | **Aðrar ognir** | | |
| | Roknaðar rentur tilgóðar | 3.486 | 4.656 |
| | Aðrar ognir | 48 | 878 |
| | **Aðrar ognir tilsamans** | **3.534** | **5.534** |
| 14 | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar** | | |
| | **Uttan uppsøgn** | **0** | **0** |
| 15 | **Innlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 292.360 | 260.214 |
| | Við uppsøgn | 527.573 | 526.293 |
| | Serinnlán | 59.912 | 50.147 |
| | **Innlán tilsamans** | **879.845** | **836.654** |
| | Uttan uppsøgn | 292.360 | 260.214 |
| | Uppsøgn til og við 3 mánaðir | 26.312 | 19.616 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 515.947 | 518.646 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 9.470 | 7.635 |
| | Yvir 5 ár | 35.756 | 30.543 |
| | **Innlán tilsamans** | **879.845** | **836.654** |



| Viðm. | | 2002<br>1.000 DKK | 2001<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 16 | **Burturleggingar til útreiðslur** | | |
| | Treytaleys eftirlønartilsøgn | 2.772 | 2.831 |
| | Útsettur skattur | 251 | 0 |
| | **Burturleggingar til útreiðslur tilsamans** | **3.023** | **2.831** |
| 17 | **Ábyrgdarpeningur** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 2.817 | 2.588 |
| | Tilgongd, netto | 125 | 229 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **2.942** | **2.817** |
| 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| | Aðrar ábyrgdir | 34.230 | 17.143 |
| | Kredittilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 1.142 | 5.424 |
| | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **35.372** | **22.567** |
| 19 | **Stjórn og nevnd** | | |
| | Lán, veðhald, borgsskyldur ella ábyrgdir og trygdir stovnað fyri stjórn og nevnd sparikassans | | |
| | Stjórn | 1.055 | 1.033 |
| | Nevnd | 2.721 | 3.496 |
| | Tilhoyrandi trygdir | | |
| | Stjórn | 1.090 | 1.090 |
| | Nevnd | 4.386 | 5.228 |
| 20 | **Kredittváðar – Útlán býtt í vinnugreinir í %** | | |
| | Almennir myndugleikar | 1 | 2 |
| | **Vinnur** | | |
| | Fiskivinna | 7 | 5 |
| | Framleiðsluvinna o.a. | 9 | 8 |
| | Byggivinna | 3 | 3 |
| | Handil, matstovu- og gistingarhúsvinna | 5 | 5 |
| | Flutningur, postur og telefon | 1 | 1 |

| Viðm. | | 2002<br>1.000 DKK | 2001<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 20 | Kreditt-, fíggingar- og tryggingarvinna (framhald) | 0 | 0 |
| | Handil og umsiting av fastari ogn | 5 | 4 |
| | Aðrar vinnur | 1 | 1 |
| | **Vinnur tilsamans** | **31** | **27** |
| | Privat | 68 | 71 |
| | **Tilsamans** | **100** | **100** |
| 21 | **Marknaðarváðar** | | |
| | Gjaldoyraváði | | |
| | Ogn í fremmandum gjaldoyra | 4.924 | 933 |
| | Skuld í fremmandum gjaldoyra | 4.376 | 346 |
| | Gjaldoyraábending | 548 | 933 |
| | Gjaldoyrábending í % av kjarnukapitali aftaná frádrøg | 0,2 | 0,5 |
| 22 | **Rentuváðar** | | |
| | Rentuváði av fíggjartólum | | |
| | – alt í DKK | 5.902 | 4.391 |
| 23 | **Skattur** | | |
| | Roknaður skattur av ársvinningi | 5.009 | 4.864 |
| | Útsettur skattur | 823 | -572 |
| | Javnan av roknaðum skatti | 0 | 6 |
| | **Tilsamans** | **5.832** | **4.298** |
| 24 | **Millumverandi við assosieraðar fyritøkur** | | |
| | Sp/f Niels Finsensgøta 7 | | |
| | Partur av partapeningi 50% | | |
| | **Útlán** | **145** | **0** |



## Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri 2002 hjá Norðoya Sparikassa er gjørdur í samsvari við lóg um bankar og sparikassar o.a. umframt kunngerð frá Fíggjareftirlitinum um framløgu av roknskapi hjá peningastovnum.

Nýtti roknskaparhátturin er tann sami, sum varð nýttur í 2001. Samanlíkningartølini fyri 2001 og 2002 eru uppgjørd eftir somu roknskaparkunngerð.

## Tíðaravmarkingar

Rentuinntøkur o.a. og rentuútreiðslur o.a. eru fult út tíðaravmarkaðar, eins og allar aðrar avgerandi inntøkur og útreiðslur eru tíðaravmarkaðar.

## Kassapeningur, innlán uttan uppsøgn hjá tjóðbankum og ogn hjá peningastovnum

Hesar ognir eru tiknar við til áljóðandi virði.



## Útlán og onnur áogn

Sparikassans samlaðu ognir eru í samsvar við góðan og varnan roknskaparhátt undirgivnar eina atfinningarsama meting við atliti til avhyljing av tapsvandum, og tær neyðugu upphæddirnar eru avsettar. Staðfest tap ígjøgnum árið eru avskrivað fult út.

## Lánsbrøv, partabrøv og kapitalpartar

Goymsla sparikassans av børsskrásettum lánsbrøvum er sett til teir almennu kursirnar við ársenda 2002.

Goymsla sparikassans av partabrøvum, ið eru óskrásett, er í mesta lagi sett til keypsvirðið.

Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum, ið eru óskrásett partabrøv, eru tiknir upp til innara roknskaparliga virðið við ársenda 2002.

## Fastar ognir

Fastar ognir eru virðissettar til keypsvirðið við ískoyti av ábøtum og við frádrátti av avskrivingum.

Ognir, sum sparikassin hevur ognað sær til egna nýtslu, verða avskrivaðar yvir 50 ár, meðan ognir, ið sparikassin hevur yvirtikið í samband við uppgerð av millumverandi, og sum skulu seljast, verða avskrivaðar við støði í árligum innanhýsis metingum av ognunum.

## Maskinur og innbúgv

Maskinur og innbúgv eru sett til keypsvirðið frádrigið avskrivingar. Avskrivað verður rættlinjað í tíðarskeiðinum, ognirnar kunnu hugsast vera haldgóðar.

## Fremmant gjaldoyra

Goymslan í fremmandum gjaldoyra er sett til skrásettu kursirnar við ársenda.

## Innlán og onnur skuld

Innlán og onnur skuld eru upptikin til áljóðandi virði.

## Skattur

Skattur av ársinntøkuni og broytingar í útsettum skatti eru útreiðsluførdar.

Design og uppseting: Vasti
Prent: Estra